


# Kirkjugarður
*á Svínaryggi*

Óli Jacobsen
olijacobsen@post.olivant.fo



# Mortensenættin á Argjum er væl umboðað í kirkjugarðinum

**Tað hava verið nógvar stórar ættir í Havn, sum tað eisini sæst aftur í gamla kirkjugarði. Ein av teimum heilt stóru ættunum eru eftirkomarar hjá Elspu og Andrass á Argjum**

Tað var í februar 1829, at Elspa og Andrass Mortansson tóku land á Argjum og bygdu har. Hann var úr Hvalba, og hon var úr Kollafirði.

Hetta er ein alment kend søga, sum millum annað er lýst í bókini hjá Niels J Arge um Argjamenn.

Børn teirra vóru:

**Mortan Andrasson** (1816-1882). Hansara ætt fekk navnið Mortensen, og gjørdist hon sera stór. Tað eru sjey sjónligar gravsteinar í gamla kirkjugarði hjá teimum. Tey sum »eiga« hesar steinar og teirra ætt verða umrødd í hesi og tveimum fylgjandi pørtum í hesi røð.

**Dánjal Andrasson** (1818-1891). Hansara børn fingu eftirnavnið Danielsen. Tey eru eisini umboðað í kirkjugarðinum. Henda ættin verður umrødd seinni í hesi røð.



*Soleiðis ímyndaði Ingálvur av Reyni sær Andrass á Argjum*



*Óli Mortensen*

**Jákup Zakarias Andrasson** (1819-1868.) Var ógiftur. Hann gjørdist krypil, men gjørdist sera kringur at smíða knívar.

**Anna Andrassdóttir** (1821-1895). Varð gift við Poul í Geil. Fleiri av hennara eftirkomarar eru umrøddir í hesi røð, sum Djóni í Geil og hansara synir Poul, Kristin og Petur Alberg, sum komandi mikudag »fyllir« 125 ár.

Eisini Elspa Sloan, systir Djóna, og Anna Petersen, dóttir Isalinu, eisini ein systir gift við gamla Knút skómakaran, hava gravstein, og tær eru fyrr umrøddar.

**Niels Lassen Arge** (1823-1900.) Hann var ættarfaðir til øll tey sum eita Arge, og tey eru mong á tali. Tey eiga nógvar gravsteinar í kirkjugarðinum, og tey eru eisini umrødd í hesi røð.

**Billa Andrassdóttir** (1825-1899), giftist á Sandi

**Lisa Andrassdóttir** (1830-1892), giftist inn á Nes í Eysturoynni.

**Niklas Andrasson** f. 1835, búði niðri.

## Erindringer fra et langt liv

Tað er merkiliga lítið, sum er skrivað um ættargreinina hjá Mortani, hóast ættin er blivin sera stór. Men her verður so tikið tað, sum er funnið í ymiskum keldum.

Jacob Andreas Arge, Jampan. var hin fyrsti, sum í dópinum fekk ættarnavnið Arge.

Í minnisgrein um ættina nevnir J.A. Arge nøkur ættarbregi, sum sipast til Hólalagsslektina í Hvalba.

Hann hevur eisini tríggjar pápabeiggjar sínar á orði. Ein teirra er Mortan. Vit loyva okkum at endurgeva brot úr hesum lýsingum hansara.. Um ættarfólkið í Hvalba skrivar hann m.a., at teir í

» – Længst svundne Tider skal være Efterkommere af Franskmænd og Irer.

Der er mange ting, som kendetegner dette. De af



*Anna var ein dóttir Elspu og Andrass. Hon var omma Petur Alberg, sum hevur 125 ára »føðingardag« komandi mikudag*

Mændene, som ikke var kæmpestore, var firskaarne, tætbyggede, med kulsort Haar og gennemgaaende kraftige; mange iltre af Sind, opfindsomme til nyttigt Arbejde baade paa Land og Hav og har altid ydet deres bedste til Fremme for Øerne.

Slægten var stærkt præget af Udlængsel til fremmede Lande, og mange af dem reiste bort og kom tilbage berigede af Kundskab i forskellige Retninger, hvilket var til stor Gavn for Øerne.....«

## Mortan

»Min Farbroder Morten var kæmpestor og stærk med kulsort Haar. Han var en meget dygtig Haandværker, Smed, Hus- og Baadebygger. Han var Formand sammen med Snedker Sivertsen ved Opførelsen af den nuverende Thorshavns Kirke.«

Mortan Andrasson var føddur í Kollafirði tann 8. juli 1816. Hann stendur fyri at hava verið timburmaður, og hann doyði á Argjum 30. januar 1882, og hann varð jarðaður 2. februar.

Mortan var giftur heilar tríggjar ferðir. Tann 21.10 1841 giftist hann í Havnar Kirkju við Elsebeth Joensdottir, fødd 15.6 1815 í Havn.

Hon doyði longu 2.3. 1845, bert 29 ára gomul.



*OLEVINE ELISABETH DEBES*
*F. MORTENSEN*
*F. 26. SEPTEMBER 1870*
*D. 4. MAI 1899*
*FRED VÆRE MED DIT STØV*

*ANNA SOFIE MORTENSEN*
*F. 29. APRIL 1833*
*D. 2. APRIL 1905*
*FRED VÆRE MED DIT STØV*

*ANDREAS MORTENSEN*
*ARGE*
*F. 23. MAI 1844*
*D. 19. MARTS 1899*
*FRED VÆRE MED DIT STØV*

Mortan giftist aftur við Johanna Elisabeth f. 15.8 1815 í Havn. Hon doyði 20.8 1886 á Argjum. Hann giftist so aftur við Elsebeth Cathrina Lindenskov f. 7.9. 1822 í Havn. Hon doyði 31.1 1912 í Havn.

Tað er eitt av hansara børnum, sum hevur gravstein í gamla kirkjugarði, og tað er Andreas (1844-1890). Henda umrøðan verður um hann og hansara.

## Óli Mortensen virkin í fráhaldsrørsluni

Ein sonur Mortan var Ole Mortensen (1850-1920), sum ikki tykist sjálvur at hava havt gravstein. Hann var timburmaður og annars álitismaður á ymiskum økjum.

Um Óla skrivaði Andrass Samuelsen, seinni løgmaður, í minningarorðum:

Jeg har kendt Ole Mortensen i over et kvart Aarhundrede. Som ungt Menneske lærte jeg ham at kende i Thorshavns Afholdsforening. Alle havde vi i Afholdsforeningen den største Respekt for Manden. Han var alvorlig og elskværdig mod os yngre, der sluttede os til den Forening, han havde været med til at bygge og som støttede den Sag, der stod hans Hjerte nær – Afholdssagen. Han var faamælt, men ingen var nogensinde i Tvivl om hans Stilling til de forskellige Spørgsmaal, der opstod i Afholdsforeningen. Han var en af Afholdssagens største Venner og Forkæmpere, og Afholdssagen har ved hans Død lidt et Tab af væsentlig Betydning.

Han var en trofast Afholdsmand, trofast som Ven og trofast som Meningsfælle. Han var en pryd for den færøske Haandværkerstand, arbejdsom, dygtig og flittig, som han var.

Han var en god Borger for Thorshavns By, og han var en god Færing af den gamle Skole.

Alle vi som kendte ham, vil savne ham og alle er vi enige om at holde hans Minde i Ære.

## Var ein stovnari av Havnar Sjúkrakassa og býráðslimur

Ole Mortensen var eisini ein av teimum, sum í 1886 var við til at stovna Sygekassen for Thorshavn og Omegn. Tað var Thorshavn Arbejderforening sum saman við Avhaldsfelagið, ið tók fyrsta stigið við at seta eina nevnd at fyrireika stovnanina. Í hesi nevnd vóru umboð fyri Arbejderforeningen og fyri Thorshavn Totalafholdsforening. Eitt av umboðunum hjá Avhaldsfelagnum var »Tømmermand Ole Mortensen.«

Hann kom eisini í fyrstu nevndina saman við Djóna í Geil, Rasmus Effersøe, Jacob Lützen og H.C. Olsen. Limagjaldið var sett til 30 oyru um mánaðin.

Nevndarlimirnir umboðaðu hvørt sítt øki i býnum, har teir skuldu hava eftirlit við sjúkrmeldaðum limum. Roknast kann við, at Ole Mortensen hevur umboðað Distrikt C, sum »Vestenfor Frederiksvaag (Vágsbotn) og Arge.«

Ole sat í nevndini inntil 1897, tá ið hann bar seg undan afturvali. Tá hevði nevndin árið frammundan søkt um statsgóðkenning.

Óli Mortensen var eisini býráðslimur í Havn. Hann varð valdur í 1903 og sat til 1908. Hann var limur í bygginevndini.

Í komandi parti verður m.a. greitt frá Frants Mortensen og Laurits Debes, sum giftist inn í Mortensensenættina. Um nakar veit meira um teir gomlu Mortensenmenninar hevði tað verið gott at frætt.